## Holyfield í HM-dysti

Amerikanski boksarin Evander Holyfield kennir ongan aldur á sær. Fyrrverandi heimsmeistarin, sum millum annað er kendur fyri at mangla ein part av vinstra oyra, ið Mike Tyson beit av undir einum dysti teirra millum, skal nú aftur boksast um eitt HM-heiti, 44-ára gamal. Talan er um ein dyst hjá felagsskapinum WBO (World Boxing Organisation) og hann verður móti russaranum Sultan Ibragimov 13. oktober í Íspaladsinum í Moskva. Holyfield hevur tapt átta av sínum 52 dystum



## Lík á Cradle Mountain

Tasmansk bjargingarfólk funnu mikudagin eitt lík á toppinum av Cradle Mountain, har sum danski fjallaklintrarin Kasper Sørensen hvarv 5. juli. Tasmanska løgreglan gongur út frá, at tala er um horvna danan, men vánaligt veður hevur higartil forðað fyri, at líkið kann verða bjargað, og harvið eyðmerkt. Tað var manningin á einari bjargingartyrlu, sum bar eyga við líkið. Enn hevur ikki eydnast at bjarga líkinum, veit Ekstrabladet.dk at siga

# Flesjarnar vunnu á stóru orkuni

**Eftir í meiri enn eitt hálvt samdøgur í dýrdarveðri at hava roynt at bjarga russiska trolaranum, sum stóð á Flesjunum, sakk Olshana klokkan átta í morgun**

OLSHANA
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*
*myndir: Jens Kristian Vang*



*Nógvur sjógvur í honum, hann var tungur aftan, og trolarin fór skjótt undir eftir reyvini, og klokkan 7.56 fór gronin undir*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Dramaið á Flesjunum í Tangafirði vardi í stívar tólv tímar. Klokkan eitt korter til átta í gjárkvøldið stóð russiski trolarin Olshana á Flesjunum, og klokkan fýra minuttir í átta í morgun sakk hann á 70 metra dýpi.

Fyrrapartin hava teir riggað av. Anni á Hædd, tilbúgvingarstjóri, sigur, at nú verður farið at eftirmeta royndina at bjarga Olshanu. Spurningurin um, hvat eitt nú skal gerast við oljuna, sum er í skipinum, er eingin avgerð tikin um enn.

Trolarin hevði verið á Kollafirði, har teir høvdu bunkrað 270 tons av gassolju. Í dýrdarveðrinum og mest sum silvitni vóru teir á veg aftur til fiskiskap, tá ið teir stóðu á Flesjunum.

Tjaldrið var eystanfyri Stongina, og tjúgu minuttir eftir neyðarkallið, var vaktarskipið hjá Olshanu. Manningin taldi 34. Bátarnir hjá Tórshavnar Skipasmiðju, Pressarin og Skúmarin, vóru skjótir á staðnum, og teir førdu størsta partin av manningini umborð á Thor, sum eisini var skjótur á staðið. Eftir umborð vóru teir níggju, sum hoyrdu til trygdarskipanina.

Kavarar staðfestu skjótt, at sjógvur kom í skipið gjøgnum rivu í bakborði. Nú verður roknað við, at hol ivaleyst eisini hevur verið í botninum.

Tað varð raðfest hægst at fáa sjógvin úr skipinum. Triton var skjótur á staðnum, og pumpur frá vaktarskipunum og úr Havnini pumpaðu, uttan at tað eydnaðist at fáa skipið lens. 15 tons av gassolju lóku úr skipinum, og við sokallaðum skimmara frá Norðoya Bjargingarfelag, sum strandferðsluskipið Sam kom av Klaksvík við, varð roynt at fáa oljuna upp.

Sambært Anni á Hædd, tilbúgvingarstjóra, vórðu fimm royndir gjørdar at toga trolaran leysan. Tann fyrsta var klokkan 2.30. Tvær royndir vórðu gjørdar klokkan 4.30, tá ið endin umborð á Triton slitnaði.

– Finnur Fríði lá á Runavík, og tá ið boð vórðu send eftir honum, var hann skjótur á staðið. Hann hevur stóra orku, og klokkan seks varð roynd við tveimum sterkum endum kring skipið gjørd. Tá loysnaði Olshana, men hann varð ikki leysur av Flesjunum, sigur Anni á Hædd.

Klokkan 7.30 varð síðsta royndin gjørd. Tað eydnaðist Finni Fríða og Tjaldrinum at fáa trolaran av Flesjunum. Tá var nógvur sjógvur í honum, hann var tungur aftan, og trolarin fór skjótt undir eftir reyvini, og klokkan 7.56 fór gronin undir.

Áðrenn síðsta royndin varð gjørd, vóru teir níggju, sum høvdu verið umborð, farnir av skipinum.

Hóast ógvuliga stór orka varð løgd í at bjarga skipinum, so var tað náttúran, sum vann.

– Í gjárkvøldið høvdu vit góðar vónir um, at tað skuldi eydnast at fáa skipið av aftur. Veðrið var gott, men vit vistu, at hann fór at øtla, og at vit tískil arbeiddu ímóti veðrinum. Tað ráddi fyrst og fremst um at fáa trolaran lens, men tað eydnaðist ikki, og sum tað leið út á náttina, bar alt meiri á tað borðið, at skipið fór at søkka. Tað gjørdi tað, tá ið tað var eydnast at fáa tað leyst. Ov nógvur sjógvur var í tí, staðfestir Anni á Hædd.

